# SEV og Maskinmeistarafelagið funnið semju

**Nú er líkt til at SEV og Maskinmeistarafelagið hava funnið fram til eina semju á sáttmálatrætuni, sum báðir partar kunnu liva við. Nú er tað bara upp til Karsten Hansen, um hann vil góðkenna hesa semjuna**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Stefan í Skorini*



*Jógvan Nybo, formaður, og hinir í nevndini í Maskinmeistarafelagnum hava góðtikið at gera eitt ískoyti til tann tvey ára sáttmálan, soleiðis at hann fevnir um eitt trý ára skeið við eini heldur lægri lønarhækking tað seinasta árið*
MYND: Jens Kr. Vang

SEV og Maskinmeistarafelagið eru komin ásamt um at gera eitt ískoyti til tann tvey ára sáttmálan, ið varð undirskrivaður 28.mars, soleiðis at sáttmálin verður longdur við einum ári. Hækkingin tað seinasta árið verður heldur lægri enn tvey tey fyrstu árini av sáttmálanum. Nýggi sáttmálin verður sostatt galdandi til 2006.

Poul Arne Jacobsen, stýrisformaður í SEV, upplýsir, at lønarhækkingin tað síðsta árið eftir ætlan skal vera 3 prosent. Hækkingin í lønini hini bæði árini var umleið 4,6 prosent. Stýrið hjá SEV hevur tikið undir við hesum leistinum.

– Miðalhækkingin yvir hesi trý árini verður samsvarandi við tað, sum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir skrivaðu undir uppá, sigur Poul Arne Jacobsen.

Stýrisformaðurin sigur, at SEV og Maskinmeistarafelagið hava samskift nógv seinastu vikurnar, síðan Karsten Hansen alment vrakaði sáttmálan, og hetta var ein loysn, sum partarnir báðir kundu góðtaka.

Hann sigur, at Fíggjarmálaráðið er kunnað um støðuna ígjøgnum telefon, og at leikluturin hjá SEV er liðugur beint nú. Nú verður bíðað í spenningi eftir, at Karsten Hansen fer at gera sína niðurstøðu.

## Alt skal vera klárt

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Jógvan Nybo, sigur, at felagið ikki fer at skriva undir eitt ískoyti til sáttmálan uttan at alt er klárt og góðkent av Fíggjarmálaráðnum.

– Tað, sum vit hava verið vitni til seinastu vikurnar, fara vit ikki at góðtaka einaferð afturat. Vit fara ikki at skriva undir og síðani uppliva, at Karsten Hansen vrakar sáttmálan. Alt skal gerast undir einum hesuferð, sigur Jógvan Nybo. Hann vil sostatt tryggja sær, at sáttmálin er góðkendur, áðrenn hann verður undirskrivaður.

Hann váttar, at partarnir eru komnir ásamt um eitt ískoyti til sáttmálan, men hann slær rimmarfast, at tann tvey ára sáttmálin, sum varð vrakaður av landsstýrismanninum, ikki verður broyttur ella avtikin.

Nevndin í Maskinmeistarafelagnum hevði í gjár fund við maskinmeistararnar hjá SEV um støðuna, og har var greiður meiriluti fyri at royna hesa loysnina. Á henda hátt varðveita maskinmeistararnir lønarhækkingina uppá góð 10 prosent við eftirløn yvir tvey ár, men teir ganga við til eina heldur lægri hækking tað síðsta árið.

Jógvan Nybo leggur afturat, at felagið ikki fer at bíða leingi eftir eini góðkenning úr Fíggjarmálaráðnum, tí støðan hjá hansara limum als ikki kann góðtakast, og um sáttmálaviðurskiftini ikki koma uppá pláss, mugu tiltøk setast í verk.

Sosialurin fekk fatur í Karsten Hansen hósmorgunin, men av tí at hann var staddur uttanlands og ikki hevði sæð semjuna millum SEV og Maskinmeistarafelagið, vildi hann ikki uppá standandi fót siga, um hann góðkennir hendan leistin. Væntandi fer Karsten Hansen at gera viðmerkingar til málið í blaðnum í morgin.

# Heimavirkið letur uppaftur í nýggjum hølum

**Týsdagin lat handilin hjá Heimavirkinum upp í bygninginum í Niels Finsensgøtu, har Radiohandilin eisini heldur til. Hetta er aðru ferð, at Heimavirkið flytir, eftir at tað helt til niðri á Kongabrúnni í eitt mannaminni**

FLYTING
*Stefan í Skorini*




*Føroyskt Heimavirkið hevur nú latið uppaftur, eftir at handilin hevur verið stongdur í góðar fýra mánaðir. Snotiligu hølini liggja sera væl fyri mitt í býnum*
MYND: Jens Kr. Vang

Nú letur Føroyskt Heimavirki uppaftur í Havn. Sølubúðin, sum hevur selt ymiskt føroyskt hondarbeiði, hevur verið stongd síðan 1. februar, tá lykilin varð snaraður um. Týsdagin lat sølubúðin uppaftur í snotiligum hølum mitt í býnum.

– Vit máttu lata handilin aftur tann 1. februar, tí sølan heilt einfalt gekk ov illa, sigur Óluva Húsgarð, virkandi formaður í nevndini fyri sjálvsognarstovnin Føroyskt Heimavirki.

Síðan 2001 og hevur handilin hjá Heimavirkinum verið í Vágsbotni, men hetta royndist ikki nakað serliga væl, og tí flytir handilin enn einaferð.

Heimavirkið varð annars sett á stovn í 1935, og frá 1937 til 2001 var handilin á Kongabrúnni. Men tá Tryggingarfelagið skuldi flyta alt sítt virksemi oman í tann bygningin, mátti Heimavirkið finna sær nýggj høli.

## Væl nøgd

Síðan 1. februar hevur Heimavirkið so leitað eftir nýggjum hølum, og eftir ein steðg uppá góðar fýra mánaðir, eydnaðist at finna eini høli, sum liggja sera væl fyri mitt í býnum.

– Vit eru væl nøgd við nýggju hølini, tí tey liggja væl fyri. Tað var snøgt sagt ikki livandi í Vágsbotni, sigur Óluva Húsgarð. Hon sigur, at fólk ikki vistu hvar Heimavirkið var, og tað er ikki so nógv fólk, sum gongur framvið har.

Og tey hava longu merkt munin, nú handilin liggur betri fyri, hóast hann bara hevur verið opin í nakrar fáar dagar. Fleiri fólk støkka inn á gólvið á veg niðan í býin, og nakrir útlendingar hava eisini verið á gátt.

Óluva Húsgarð sigur, at hetta er ein royndartíð. Handilin verður opin í summar, og um tað ikki gongur, so steingir hann møguliga aftur í september og letur uppaftur á jólum.



*Nú ber aftur til at keypa føroyskt hondarbeiði í Heimavirkinum. Handilin lat uppaftur týsdagin*
MYND: Jens Kr. Vang



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Tíggju systkin av Strondum

Tá Nicolina Jensen Beder í Havn fylti 75 ár tann 26. apríl, komu øll systkin hennara til føðingardagin. Tey eru tilsamans 10 systkin, børn hjá Sannu, f. Lamhauge, og Bartal Johansen á Strondum. Staðið har tey har tey búðu á Strondum verður nevnt " í Kass", tí fingu allir synirnir sær eftirnavnið, Kass. Á myndini eru øll systkini.



*Aftara rað: f.v.Jóhanna M. Lund, býr í Vejle, Jóhan Kass, býr á Strondum, (Jóhanna og Jóhan eru tvíburar), Judith Johansen, býr í Vejle, Ernst Kass, býr í Havn, Hans Jákup Kass, býr í Helsinki, Anna Bertha Mohr, býr í Havn. Fremra rað: f.v. Sólborg Dulavík, býr á Argjum, Jákup Kass, býr á Strondum, Nicolina Jensen Beder, býr í Havn, og Hilmar Kass sum býr í Havn*

Við takkarkvøðuni hjá Peturi Müller, sendi eg bestu tøkk til øll tykkum, ið mintust meg føðingardagin 26. apríl.

***Takkarljóð***
*Eg takklætislag lati ljóða –*
*til ein hvønn í huga meg bar.*
*Tann dagin, ið eg hevði slóða –*
*til sjeytifimmárs varðan hjá mær.*
*Til vinnufelagar allar,*
*og øll ið meg vitjaðu her.*
*Hav tøkk bæði moyggjar og kallar –*
*Til tykkum mítt takkarljóð fer.*

Ein serstøk tøkk til øll systkin míni.

Bestu heilsanir
**Nicolina**

# Dugnaskaparroynd í motorlæru



*Fremra rað: f.v. Alfred Haraldsen, Tórshavn, Heini Heinesen, Argir, Tórshavn, Páll Nielsen, Tórshavn. Aftara rað: f.v. Napoleon Nólsoy, skúlastjóri, Bárður Olsen, Tórshavn, Grethard Poulsen, Tórshavn, Jógvan Hendrik Sigurstein, Tórshavn, Kaj Vilhelmsen, Hoyvík, Gordon Hofgaard, lærari. Á myndini vanta: Petur Elias Debes, Miðvágur, Kartni Fornagarð, Tórshavn, Ragnar Justinussen, Tórshavn, og Terji Sigurdsson, Tórshavn*

11. juni fingu 11 næmingar prógv í dugnaskaparroynd í motorlæru. Tað er Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, ið skipar fyri hesi undirvísing. Dugnaskaparprógvið veitir rættindi at passa motorar við framtøkumegið upp til 612 HK í heimasigling, t.e. innan fyri 200 fjórðingar. Undirvísingin var á Maskinmeistaraskúlanum, skeiðið byrjaði í oktober 2002. Undirvíst varð í maskinlæru, ravmagnslæru, kølitøkni, eldsløkking og tænastukunnleika.

## Eiler Poulsen 50 ár



12. juni fylti Eiler Poulsen í Havn 50 ár. Eiler er føddur og uppvaksin í Saltangará. Hann er triðelst av teimum níggju børnunum hjá Henny og Jens á Líknargøtu í Saltangará. Liðugur við barnaskúlan fór hann til skips og sigldi í 12 ár, til 1979, tá hann fór at arbeiða sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Frá 1984 til 1993 arbeiddi hann sum maskinførari hjá byggifelagnum Dekkon. Hann arbeiddi á Havsbrún í Fuglafirði frá 1993 til 2001, tá hann mátti gevast vegna sjúku.

Eiler er giftur við Hallbjørg Hansen úr Fuglafirði, tey eiga tvey børn, dóttrina Henny, fødd í 1976, og sonin Arthur, føddur í 1980.

Familjan búði í Saltangará til 1989, tá tey fluttu til Kambsdal at búgva. Fyri stuttum fluttu tey til Havnar.

## Dagurin

**13. juni. Kyrillos.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, helst er her talan um ein biskup í Aleksandriu, sum doyði í 444. Erlendur biskupur doyr hendan dagin í 1308.